Regin Vágadal var ikki í essinum

Føroya sterkasti maður, Regin Vágadal, endaði á fjórða plássi, tá Atlantic Giant kappingin varð hildin um vikuskiftið. Vinnarin var Svend Karlsson úr Noregi, og hann var eisini mest sannførandi luttakarin í kappingini

ATLANTIC GIANT
Stefan í Skorini

Heimsins sterkasti maður gjørdist eisini vinnari av Atlantic Giant kappingini, sum var um vikuskiftið. Sven Karlsen úr Noregi vann frammanfyri danan Réne Minkwitz, meðan Regin Vágadal endaði á fjórða plássi. Zadrunas Savickas tók triðja plássið frá Regini.

Regin Vágadal hevur vunnið hesa kappingina tvey tey seinastu árini, men hesuferð gekst ikki so væl í hond sum undanfarin ár, tá hann ordiliga hevur verið í essinum á heimavølli.

– Eg eri als ikki nøgdur við hesa kappingina, tí eg hevði væntað mær eitt frægari úrslit, sigur Regin Vágadal.

Misti í fyrsta umfari

Fyrsta kappingin var at lyfta fleiri rundar steinar uppá stólpar. Í hesi kappingin stendur Regin seg vanliga sera væl, men Regin var óheppin og misti tann fimta og seinasta steinin. Hetta seinkaði honum nógv, og hann fekk bara eitt sætta pláss. Hann datt tí burturímillum beinanvegin.

Um Regin skuldi gera sær nakra vón um at vinna samlaðu kappingina, so var hetta ein grein, sum hann skuldi standa seg væl í, tí hetta er ein av hansara yndisgreinum. Tíverri misti hann í avgerandi løtuni, og tað var sera torført hjá honum at vinna munin innaftur.

Regin hevði annars fyrireikað seg sum vant og helt seg vera í hampuliga væl fyri til kappingina. Tað eydnaðist honum tó ikki at vinna heitið Atlantic Giant triðju ferð á rað.

Høllin var at kalla fullsett í Runavík fríggjakvøldið, og Regin fekk góðan stuðul frá áskoðarunum á Skálafjørðinum. Í Havn vóru fá fólk til kappingina, og hýrurin var heldur linligur.

Vann endiliga

Í næstu kappingini endaði Regin á sjeynda plássi, og tá var hann í roynd og veru úti av kappingini um gullið. Hetta var rættstøðulyft, og tað er ikki ein grein, sum Regin vanliga stendur seg væl í.

Í triðju greinini, sum var mylnugongd, kom Regin endiliga fyri seg. Hetta er ein kapping, har teir sterku menninir skulu ganga runt um eitt kumpass við einum tungum kassa. Her gjørdi Regin bart og legði allar hinar afturum seg. Tað tóktist tó ov seint hjá honum at fanga Sven Karlsen aftur.

Í tveimum teimum seinastu greinunum, sum vóru á skránni í Runavík, stóð Regin seg hampuliga væl, men Sven Karlsen og Réne Minkwitz hildu allatíðina tørn.

Stóð seg væl í Havn

Regin Vágadal kom væl frá greinunum, sum vóru á skránni í høllini á Hálsi í Havn. Fyrsta greinin var log lift, men Regin megnaði bara at lyfta 130 kilo, hóast metið hjá honum er 152 kilo. Sven Karlsen vann kappingina við at lyfta 160 kilo. Tá hálaði hann seg so mikið langt framum hinar, at eingin megnaði at taka hann aftur, hóast Réne Minkwitz gjørdi eina djarva roynd.

Næsta greinin var dead lift, har teir skuldu halda tveimum tunnum, sum vigaðu 250 kilo hvør. Í hesi greinini endaði Regin á triðja plássi meðan Savickas og Karlsen vóru frammanfyri.

Seinasta greinin var at flyta fýra tungar kaggar úr einum staði í eitt annað. Regin var hesuferð miðskeiðis í røðini, og hann misti samstundis triðja plássi til Savickas. Teir endaði báðir við 61 stigum, men av tí at Savickas hevði vunnið fleiri kappingar, streyk hann avstað við bronsuni.

Samanumtikið var Sven Karlsen óivað sterkasti luttakarin í hesi kappingini, og hann fór uppiborið avstað við gullinum í viðførinum. Regin var tó bara 9,5 stig aftanfyri vinnaran Karlsen, og tá havt verður í huga, at hann var óheppin í fyrstu greinini, so var tað kanska ikki av heilt av leið hjá Regini.

Hann saknaði tó stuðul frá havnarmonnum, tí áskoðararnir vóru sera fáir í tali.



Regin Vágadal roynir seg í at halda einum hálvum tonsi uppfrá gólvinum. Hann var tó als ikki nøgdur við sítt egna avrik í kappingini

Mynd: Álvur Haraldsen



Regin Vágadal lyftir kaggar í seinastu kappingargreinini. Hann endaði á einum fjórða plássi, eftir at hann hevur vunnið kappingina tvey ár á rað

Mynd: Álvur Haraldsen

Norðmaðurin Sven Karlsen vann kappingina, og hann var sum vera man sera fegin um úrslitið

Mynd: Álvur Haraldsen

LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

KADETT 1.3 SL
til sølu. Árg ´86, km.126.500 nýggj kobling og bremsur Sýnaður 24-04-02 ongan kross, kr. 10.000.
Tlf. 214470 e.kl. 16:30

FORD ESCORT CLX
diesel, árg. 1995, er í góðum standi. Fá nærri at vita um bilin, við at ringja
tlf. 311950 ella 211950

SCANIA 82 H
4 x 2 við 11 tons krana, skiftilast og grabba, biliga til sølu.
Tlf. 213195 ella 444642

ROVER 25
7 mðr. gamal, pikadekk á felgum, CD o.m.a. Seldur vegna flyting.
Tlf. 264063 ella 316740

GER KVETTI!!
Toyota Corolla frá 1988, í góðum standi til sølu fyri 12.000 kr. Vinarliga ring á
tlf. 321142/284142 ella 222949

TIL SØLU
Eldri lastbilakrani EFFER 10 t. m biliga til sølu.
Tlf. 213380 ella 373380

FORD ESCORT 1.1
árg. 89, biliga til sølu.
Tlf. 310336 eftir kl. 17

TIL SØLU
Ein 6 ára gamal Saab til sølu.
Tlf. 444025 ella 422090

TOYOTA COROLLA
sera væl hildin. Til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 214233 ella 372299

EYKADEILIR
Nógvir plátudeilir og annað til Honda Accord árg. 87-89 til sølu fyri rímiligar prísir.
Tlf. 449005 ella 219005

SLEIPIKRÓKUR
til Peugeot 306 Sedan, til sølu fyri 1.500 kr.
Tlf. 447830

SUMMARDEKK
Tvey lítið slitin summardekk av merkinum Potenza S02, stødd 195/50-15, til sølu fyri 1.000 kr. Nýprísur 2.250 kr.
Tlf. 228148

TIL SØLU
Fýra nýggj Bridgestone summardekk, 195/60 R 15, til sølu.
Tlf. 223700

TOYOTA CCROWN 2,2D
sýnaður í sept. 00, til sølu.
Tlf. 264269

OPEL KADET 1,6S
Nýsýnaður og í góðum standi, til sølu.
Tlf. 264269

BILUR YNSKIST
Japanari, árg. 92-95, ynskist til keyps fyri sámuligan pris.
Tlf. 224910

MITSUBISHI GALANT
Diesel, 12 ára gamal, selist biliga. Møguliga til reservadeilir.
Tlf. 322259 ella 210150

SUMMARDEKK Á FELGUM
Fýra nýggj summardekk á felgum – 4 hol – merkið Tyfon 155 x 13, til sølu.
Tlf. 217665 ella 447665

FIAT DUNA 70
weekend, árg. 88, biliga til sølu.
Tlf. 217665 ella 447665

TIL SØLU
16" sportfelgur við 205/50 R16 dekkum, hava staðið á einum Opel Ascona passa eisini til aðrar bilar, felgurnar eru 11/2 ára gamlar. Nýprísur 10.000 kr, til sølu fyri 5000 kr.
Tlf. 224725

RENAULT 19
Renault 19 árg. 11/94 til sølu.
Tlf. 254111

EYKALUTIR
til Toyota Hiace diesel, árg. 90-95 til sølu.
Tlf. 227922

TITANIUM
4 stk. titanium 7 x 15" 5 hol, við tveimum dekkum 205/50 R15, passa til Toyota Carina II, Carina E og Camry til sølu.
Tlf. 227922

EYKALUTIR
til sølu til Toyota Carina st. 171 og 88-91 hurðar, síðurútar, bakrútur, spegl, startari, drivaksil, sentrallás og kúfangari framman.
Tlf. 227922

FELGUR
Fýra stk. 15" felgur og dekk til Toyta Hiace, árg. 90-95, til sølu fyri 2500 kr.
Tlf. 227922

FORD ESCORT 1.6
til sølu, árg. 88, hevur koyrt 84.000, el-rútar, sóltak, fýra summardekk og vetrardekk til sølu fyri 15.000 kr.
Tlf. 217102

FORD SIERRA
1,6 stationcar, 167.000 km, árg. '87, til sølu fyri kr. 2500,-
tel. 321007

TOYOTA CAMRY 2,0 GLI
árg. 87, til sølu.
Tlf. 251280, e. kl. 15

FORD SIERRA 2.0 stw.
til sølu. Árg. 7/88, sýnaður í mai 2001. Hevur anhangarakrók og er í góðum standi.
Tlf. 255754

TIL SØLU
Toyota Corolla 1.3 GLS, hevur koyrt 59.000 km, árg. 97, hevur el-sóltak og 15 tumma sportsfelgur. Stereoanlegg v/ sub. og forsterkara og pikadekk fylgja við.
Tlf. 250288 ð 252047

TIL SØLU
Fýra 15 tumma stálfelgur við skálum, 4 hol, til Opel Astra ella Vectra. Fýra brúkt summardekk, 195-65-15. Fýra brúkt summardekk, 195-60-15. Til sølu saman ella hvør sær.
Tlf. 319399

TIL SØLU
Nýsýnaður Nissan Micra, 5 hurðar, sera økonomiskur, til sølu fyri einans 15.000 kr.
Tlf. 221026

TOYOTA COROLLA G6R
1 1/4 ára gamal, reyður, senkaður, koyrt 15.500 km, sera væl hildin. Til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 223066 - 220700

Amboð

SLÁIMASKINA TIL SØLU
Tielbürger sláimaskina í góðum standi til sølu.
Tlf. 223527

HAVAFRESARI TIL LEIGU
5 HK til leigu. Vælegnaður til moldfresing v.m. Áhugað kunnu ringja
tlf. 223527

TIL LEIGU
Gravimaskina (1500 kg.) á beltum til leigu. Vælegnað til arbeiðir s.s. grava fyri rørum, kaðalum, formum, urtagarðum v.m.
Tlf. 223527

AMBOÐ
· Tvangsblandarir
· Blandimaskinur
· Glittemaskinur
· Bjálkavibrator
· Stavivibrator
· Betongslípimaskinur
og mangt annað
Søla & útleigan
Kaj Andreasen & Co
Tel. 315600 - Fax 318008

Arbeiði

ARBEIÐI YNSKIST
Eg eri ein 13 ára gamal drongur, ið søkir arbeiði í Havn ella á Argjum – alt hevur áhuga.
Tlf. 316212

URTAGARÐSARBEIÐI
Ymiskt urtagarðsarbeiði verður gjørt.
Tlf. 310352

TILBOÐ
Biðið verður um tilboð (óbindandi) upp á umvæling av eldri betonghúsum í Skálavík. Umvælingin umfatar í høvuðsheitum skiftan o.t. av : Taki (+ tróður, isolering)Vindeygum og hurðum. Klæðing uttan við træ. Klæðing av grund við t.d. (stein)plátum. Kamin (nýggja).
Tlf. 317791

ARBEIÐI YNSKIST
38 ára gomul kvinna søkir reingeringsarbeiði í Havn.
Tlf. 261646 ella 321646

Barnaansing

BARNAANSING
Vit leita eftir gentu/konu at ansa eftir 14 mðr. gomlum drongi gerandisdagar kl. 8.00-15.00 frá 1. mai til 1. juli.
Tlf. 319941 ella 218562

Barnaútgerð

GRULVIGARÐUR TIL SØLU
Grulvigarður, úr træ við rimum, stødd: 70 cm høgur, 75 cm breiður, 95 cm langur. Brúktur til eitt barn, sum nýggjru, til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 282083 ella 223337

BABYLYFT OG AMMIPÚTA
Babylyftin er blá, vælhildin og sær út sum nýggj. Til sølu fyri 300 kr. Ammipútan er næstan óbrúkt. Til sølu fyri 100 kr. Kann keypast hvør sær!
Tlf. 314624 ella 215353

BARNAVOGNUR
Grønur barnavognur av merkinum Jane til sølu fyri 2.000 kr. Sær út sum nýggjur.
Tlf. 317771

TIL SØLU
Barnavognur svartur, nýprísur 3300,- nú 2.500,- Puslborð við baðikar kr. 300,-. Bilstólur 1/2 ára gamal 0-18 kg. 500,- kr.
Tlf. 253264

TIL SØLU
Bilstólur 0-13 kg. og 2 skrástólar (babysittarar) til sølu.
Tlf. 374455

Bátaútgerð

TIL SØLU
Tvær lítið brúktar BJ 5000 el snellur, eru nýumvældar. Prísur: 6.000 kr. stk. 1 FE 400 Pappírlodd. Prísur: 500 kr.
Tlf. 223155

BÁTUR TIL SØLU
M/B Eyðin, 32 fót Scania plast, við ella uttan fiskiloyvi til sølu, um nóg høgt boð fæst.
Tlf. 444666 ella 214666

BEDINGSSPÆL
til sølu fyri 13.000 kr.
Tlf. 211235

STÝRIHÚS
við rútum, av timbur og avs. dúrk til sølu fyri 6.000 kr.
Tlf. 211235

YNSKIST
Gott línuspæl ynskist til keyps.
Tlf. 222386

MOTORUR TIL SØLU
Ford Dolphin 120 hk. Borg-Warner gear, AS7-73G, 2:1. Í góðum standi.
Tlf. 318286 ella 218286

Bingo

GOTT BINGO
verður í Pálsstovu mánakvøldið 6. mai kl. 19.00. 15 plátur 100 kr. Á lutaseðlinum eru 15 vinningar. Høvuðsvinningur: Sjónvarp.
Astma- og Allergifelagið

ARGJA RÓÐRARFELAG
Rimmar bingo verður í Róðrarneystinum 2. mai kl. 19.00. Full pláta 400 kr. 6. og 12. spæl 500 kr. 15 plátur fyri 100 kr. Eykaspæl. Á lutaseðli 15 vinningar, m.a. 2x500 kr., 1x1.000 kr., balja við mati og uttanlands flogferð. Koyring heim.
Argja Róðrarfelag

BÁRU-BINGO
Heimabingo fæst til keyps á posthúsinum og í sølubúðum um alt landið. Tú sært beinanvegin um tú hevur vunnið.
Bygdarfelagið Báran í Árnafirði

GOTT BINGO
Verður í Glæmuni í Kvívík mánakvøldið 13. mai kl. 19. 12 plátur 100 kr. Drigið verður millum spølini. Høvuðsvinningur á lutaseðli gávuskort á 1.000 kr. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Glæman

Bøkur

BÍBLIULEKSIKON TIL SØLU
Tað sera vælumtokta "illustreret bibelleksikon" til sølu fyri bert 1000 krónur. Nýprísur 2500 krónur.
Tlf. 228492

Burturm. /funnið

FARTELEFON FUNNIN
Ericsson T20s funnin í viðarlundini. Eigarin verður biðin um at ringja á tlf. 311562 og
spyrja eftir Kristinu

Býli

HÚS Í KLAKSVÍK TIL SØLU
Um hóskandi boð fæst eru húsini á Torvgøtu 18 til sølu. Húsini eru í tveimum hæddum á 75 fermetrar. Báðar hæddirnar eru innrættaðar. Til húsini eru garasja við grøv og frítt standandi hjallur.
Tlf. 255841 eftir kl. 18

HÚS Í SØRVÁGI
Hús til sølu í Sørvági, við síðuna av Sparikassanum.
Tlf. 332251

ÍBÚÐ SØKIST
Vit eru ung hjún, ið fegin vilja leiga eina íbúð sum skjótast. Vit eru álítandi, fara væl um, eingi børn og roykja ikki.
Tlf. 262178 - 221709

ÍBÚÐ YNSKIST
Friðarligur, einligur maður við føstum arbeiði søkir eftir íbúð í Havn. Roykir og drekkur ikki.
Tlf. 261346

EIGARAÍBÚÐ TIL LEIGU
Byggiár 1990, 112 fermetrar, 3 kømur, stova-køkur í einum, gongd, bryggers, 2 wc, durur, trý seinast nevndu við hita í gólvinum. Íbúðin er í stovuhædd við góðum útsýni. Partvís møblerað. Prísuppskot um 9.000 kr. um mðr. + ljós og hita.
Tlf. 313339, best seint um kvøldið

TIL SØLU
Hús á Marknoyri í Vági til sølu.
Tlf. 373231 ella 211231, e. kl. 18

DESPERAT!
Eg og pápi mín mugu hava funnið okkurt at búgva í áðrenn 1. juli ella verða vit heimleys. Vit ynskja eina íbúð við tveimum kømrum og tað má vera í Havn vegna arbeiði. Vita tit um okkurt, so vinarligast ringið til okkara skjótast gjørligt á tlf. 315700 ella
264681

ER TAÐ NAKAR
ið kann hjálpa okkum. Vit eru eitt par, ið sóknast eftir eini íbúð ella verilsi.
Tlf. 261187

ÍBÚÐ Í KLAKSVÍK
Eg eri einlig mamma við 1 barni, vit eru friðalig og fara væl um. Vinarliga ring
322416 ella 253264

ÍBÚÐ ELLA HÚS YNSKIST
til leigu skjótast gjørligt. Helst í Tórshavnar kommunu. Vit eru eitt par við einum barni, ið skal í Eystursklúanum í summar.
Tlf. 315913

ÍBÚÐ SØKIST
Eg eri ein 32 ára gamal maður, ið søki eftir íbúð í Havn. Havi gott, fast arbeiði og gjaldi til tiðina.
Tlf. 261659

BYGDARSTOVAN Í HESTI
verður leigað út við atgongd til svimjihylin. Áhugað kunnu ringja
Tlf. 212179 - 328035

ÍBÚÐ/KAMAR
ynskist í Keypmannahavn til lesandi drong.
Tlf. 316671 & 216673

ÍBÚÐ Í KEYPMANNAHAVN
Er nakar, sum hevur eina íbúð at leiga/framleiga mær í tiðarskeiðnum 1. mai - 1. desember.
Tlf. 319325 ella 250550

Lýsingartekstur

_____

_____

_____

_____

_____

_____

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
(set X) undir teiginum:

❑ Akfør	❑ Amboð	❑ Arbeiði
❑ Barnaansing	❑ Barnaútgerð	❑ Bátaútgerð
❑ Bingo	❑ Brævaskifti	❑ Burturm./funnið
❑ Býli	❑ Bøkur	❑ Dansur
❑ Dýr	❑ Fundir	❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv	❑ Lutaseðlar	❑ Leikur
❑ Matur	❑ Pløgg	❑ Samband
❑ Súklur	❑ Teldur	❑ Tónleikur
❑ Út-& sjónvarp	❑ Ymiskt	❑ .....

in ana vao ni i aafi o a. .v. . a in i a a ai avao ni a i i. in ana i a a afi o a i i aif nn o na.

Sent hevur:

Navn:……..

Bústaður:……

Bygd/býur:……

Tlf.: ……...

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki